**Leiðslufundur 21. februar 2017**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar : | Sigurð í Jákupsstovu, Hans Pauli Joensen, Hans Andrias Sølvará, Jørgen Meitilberg, Bergur D. Hansen og Janus Jensen |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | týsdagur, 21. februar 2017 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |

**Mál til umrøðu:**

1. **Fíggjarstøðan fyri deildina í mun til budgettið – gjøgnumgongd í BSL**

Fíggjarleiðarin hevur sent boð út til dekanarnir, um at innrita í BSL (búskaparskipan landsins) og tilmæla mánaðarliga roknskapin mótvegis fíggjarleiðaranum.

2. **Skráseting av skeiðum í próvbókini**

Tað er umráðandi at skeiðslýsingar koma inn í próvbókina skjótast gjørligt. Summar útbúgvingar eru ikki ajour í próvbókini, hetta er ikki nøktandi. Dekanarnir arbeiða við at fáa allar skeiðslýsingar skrásettar í próvbókina sum skjótast.

3. **Nýggj heimasíða - lýsing av útbúgvingunum**

Nýggja heimasíðan varð gjøgnumgingin. Lýsingar av útbúgvingunum skulu vera Lestrarskrivstovuni í hendi skjótast gjørligt. Heimasíðan verður eftir ætlan opnað 1. mars 2017.
Reglugerð fyri gjald fyri stakskeið liggur ikki á heimasíðuna, hetta má fáast í rættlag.

4. **Ymiskt:**
    - **a.** Leiklutin hjá FMD viðvíkjandi rættstavaranum varð umrøddur. Málið verður tikin upp á deildarfundi á FMD.
    - **b.** Íslendski forsetisráðharrin kemur til Føroya. Í hesum sambandi ætlar hann at halda ein fyrilestur á Fróðskaparsetrinum týsdagin tann 16. mai kl. 11.
    - **c.** Bergur kunnaði um, at Føroyamálsdeildin og Námsvísindadeildin í felag fara at bjóða eitt skeið út í november 2017 í máltøku hjá føroyskum børnum, ætlað dagstovnaøkinum. Sissal Maria Rasmussen á Føroyamálsdeildini fær ábyrgdina fyri skeiðinum, sum í stóran mun fer at byggja á granskingarúrslit hjá henni. Skeiðið verður skipað sum gjaldsskeið á BA-stigi, 10 ECTS. Seinni fara skeið at verða boðin út um føroyskt sum annaðmál, og ætlanin er at savna hetta virksemið í einum depli, sum Føroyamálsdeildin og Námsvísindadeildin koma at vara av.
    - **d.** Ragnheiður Bogadóttir er sett í starvið sum adjunktur í samfelagsfrøði. 15 umsóknir komu til starvið.